# Snæbjørg Ørvarodd til minnis

Tá vit fingu boðini um at Snæbjørg ikki longur var okkara millum, kom hetta øllum dátt við, sjálvt um hon í fleiri ár var merkt av sjúku, gramdi hon seg ongantíð, var altíð lívsglað og var aldrin mótfallin.

Hon hevði tað styrki at lata sinni vinna á kroppi og sjúku.

Tað er stórur saknur hjá okkum í Astma/Allergifelagnum at hava mist ein so góðan stuðul, hon var sera virkin og gekk høgt upp í arbeiði hjá felagnum.

Góðu tit øll í stóðu henni nær, má Harrin styrkja tykk0um í sorg tykkara.

Ærað verður minnið um Snæbjørg Ørvarodd.

**Føroya Astma/Allergifelag**
**Sigrun Rubeksen, form.**



## Til minnis um Tove S. Tausen

Ein rósa vaks upp
hon var mær so kær.
Hon er ikki meira,
nú følnað hon er.

Tú segði so ofta:
»Eg elski teg omma«
Á, hvat er tað svárt,
aldrin hoyra teg meira.

Ja, elskaða Tove, vit sakna teg sáran,
men heima hjá Jesusi
síggjast vit aftur.
Har verður ei saknur, ei sorg
ella pína. Har verða vit saman
í gleði og gaman.
Tí sum tú segði:
»Jesus, hann veit altíð best«.

**Omma**

# Nú kemur Asbjørn til Føroya

**Hósdagin og fríggjadagin í hesi vikuni fer kendi danski glímarin Asbjørn Riis at hava framførslur í SMS.**

TÍÐINDASKRIV



Í hesi vikuni er forkunnug vitjan í SMS. Gesturin er danin og glímarin, Asbjørn Riis. Ella sum hann eisini er kendur, The Great Dane.

Eyknevnið kemur ikki av ongum. Maðurin vigar 140 kilo, og hesi kilo eru ikki fiti, men 100% vøddar. Harafturat brúkar hann 49 í skóm!

Fólk kenna hann kanska sum hjálparmannin í sjónvarpssendingini, Fangerne paa Fortet, ið varð send á TV3 fyri nøkrum árum síðan. Men eisini er hann kendur, tí hann minnir um amerikonsku glímarastjørnuna, Hulk Hogan.

Harumframt er Asbjørn Riis sæddur í mongum hjáleikluti í amerikonskum filmum.

Asbjørn hevur verið víða. Eitt tíðarskeið búði hann í Amerika. Samanborið við Norðurlond, er USA ikki friðarligt stað at vaksa upp í, og tá ið Asbjørn varð vorðin pápi fyri 4. ferð (hann eigur fýra dreingir) kom hann til ta niðurstøðu, at ferðasambondini millum londini gera heimin somikið minni, at óneyðugt var at búgva í USA. Hetta hóast meginparturin av arbeiði hansara
varð gjørt har.

Asbjørn sigur, at skuldi hann valt eitt annað land at búð í, hevði tað verið Kanada.

Men, leggur hann við einum brosi afturat, -eg havi jú ikki verið í Føroyum enn. Eg havi bara hoyrt gott um landið og føroyingar, og eri sjálvandi sera spentur at koma á vitjan, sigur hann.

Við sær á ferðini, hevur Asbjørn konuna og ein av synunum.

Asbjørn hevur seinastu árini arbeitt nógv við børnum.

Hann hevur m.a. verið vertur í danskari barnasending á TV2, ið nevndist, Børnebussen. Eisini eru framsýningar hansara fyri børn. Í donsku miðlunum eru øll at kalla samd um, at Asbjørn dugir væl at vekja áhugan hjá børnum.

Børnini sleppa at royna seg sum glímarar, og samstundis greiðir Asbjørn frá, hvussu umráðandi tað er at eta heilsugóðan mat og gera likamligar venjingar.

Lívsáskoðanin hjá Asbirni er, at tá ið tú kennir teg væl, batnar trivnaðurin eisini. Og betur tú trívist, betri verður lívið. Byrjanin er at venja. Tá ið tú venur, fært tú eisini hug at eta heilsugott.

Tað er hetta við at venja og eta góðan mat, ið Asbjørn ger nógv burturúr, tá ið hann framførir. Hann prátar ófort alla tíðina, og dugir væl at bera
álvarsama boðskap sín fram í skemtiligum hami.

Asbjørn er fimleikari, og hesi evnini nýtir hann eisini, tá ið hann glímist saman við børnum. Hann dugir at tveita seg soleiðis, at tað tykist sum tað veruliga er tað 5 ára gamla barnið, ið er við yvirlutan. Undanfarnar framførslur hava víst, at tá ið børnini hava upplivað slíkt, vilja tey eisini sleppa at royna seg..

Fyrireikararnir siga í tíðindaskrivinum, at vónandi fara nógv ung at leita sær niðan á Torgið at royna seg sum glímarar. Framførslurnar hjá Asbirni verða á Torginum hósdagin 17. oktober kl. 16.00 og fríggjadagin 18. oktober kl. 13.00 og 17.30. Aftaná skrivar hann autografar.

Í hesi vikuni verður eisini seinna umfarið í spurnakappingini um Asbjørn á heimasíðuni hjá SMS, www.sms.fo Íalt fýra vinnarar verða funnir, og teir sleppa allir út at eta saman við Asbirni í nýggja matarstaðnum í SMS fríggjadagin 18. oktober, umframt teir vinna vinningar frá Jolly, sum er høvuðsstuðul í sambandi við vitjanina hjá Asbirni í Føroyum. Lesið meir á www.sms.fo.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum,
sum á ymsan hátt sýndu samkenslu og hjálpsemi,
tá góða mamma, vermamma og omma okkara

**Martha Holm**
Tvøroyri

andaðist og varð jarðað.

Hjartans takk til tykkum hjá heimahjálpini
og personalið á Suðuroyar sjúkrahúsi
fyri tað umsorgan, ið varð sýnd mammu.

Takk til berarar, sangarar, gravara, prest
og tykkum, sum hjálptu til við ervinum.

Takk fyri blómur, kransar og gávur.
Hjartaliga takka vit øllum tykkum,
sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

**Birger, Marni, Helle, Maria, Anita og Jacob**

# Gott at dansa á Jólum

TÍÐINDASKRIV

Nú eru jólini skjótt í hondum, og tá er eisini lívligt í vikuskiftinum. Nógv jólaborðhald eru; nógvir útisetar koma heim at vitja.

Alt hetta ger, at sera nógv fólk leita sær í býin at dansa og hugna sær hesi kvøldini.

Hetta ger eisini at ringt er at sleppa inn í tey føstu dansistøðini og nærum ógjørligt at fáa pláss at dansa.

Tí fer dansifelagið „Kom og dansa“ at skipa fyri einum jóladansi, so at fólk, sum hava hug at fara í býin fyri at dansa og hugna sær annars, kunnu gera tað uttan at standa sum sild í tunnu.

Tiltakið verður í Ítróttarhøllini á Hálsi leygarkvøldið 7. december, og vera tað teir vælumtóktu Twiligth sum fara at spæla til dansin.

Høllin á Hálsi er stór og og rúmlig, har gott pláss er at dansa.Borð og stólar verða sett upp, og høllin verður pyntað, eisini verður møguleiki at keypa okkurt leskandi eins og okkurt verður at fáa til matna.

Twiligth hava spælt til dans í mong ár og spæla teir sera góðan og fjølbroyttan dansitónleik.

Tiltakið var eisini í fjør og var tað sera væleydnað siga stigtakararnir, sum vóna at hetta verður eitt afturvendandi tiltak til gleði fyri bæði ung og eldri.

Aldursmarkið er sett til 20 ár.






3VINIR GSM

25% bíligari

Allir GSM kundar, sum hava Vanligt hald, Vinnu hald ella GSMFrítíð, kunnu nýta 3vinir tænastuna. Veljast kann frítt, um nummurini skulu vera til eina aðra GSM, til eina fastnettelefon ella til eitt nummar uttanlands.

3VINIR gevur tær møguleika at ringja bíligari til trý yndisnummur.

1. nummar -25%
2. nummar -20%
3. nummar -15%

Tú fært sendandi eitt postkort - skriva tíni trý yndisnummur, send inn, og tú ert væl áleiðis til eitt betri lív.

3VINIR umfata ikki Inmarsat, Iridium og aðrar sertænastur, sí annars www.tele.fo.

3VINIR GSM

FØROYA TELE
Skapið framtíðina saman við okkum